## Framvegis vinarsamband við Hirtshals

Í løtuni hevur Runavíkar kommuna vinarbýarsamband við fýra kommunur í Norðurlondum: Egilstaðir og Ísafjørð í Íslandi og Uummannaq í Grønlandi umframt Hirtshals í Danmark. Her hendi kortini tann broytingin við ársskiftið, at Hirtshals kommuna fór upp í ta størru Hjørring Kommune. Áhugi var kortini úr Hirtshals at halda fast við vinarsambandið, og tí var hetta eitt av málunum á seinasta býráðsfundi. Sami áhugi var eisini úr Runavík, og tí er Hirtshals, eins og áður ein av vinarbýunum hjá Runavíkar kommunu.



## Aborigianarar í grønlendskari støðu

Í Australien umhugsar stjórnir nú, at seta »grønlendskan stand« í verk millum upprunafólkið, nevnt aborigianarar. Trupulleikin er kynslig misnýtsla av børnum í fjarskotnum aborigianarasamfeløgum, sum forsætisráðharrin, John Howard skýrir tjóðskaparliga kreppu. Hann ætlar at banna alkohol í eitt hálvt ár, og gera sosialar veitingar tengdar at uppførsli í lokalsamfeløgunum. – Hetta verður gjørt í eini roynd at verja ung, sun ongatíð hava kent ein sorgleysan barndóm, sigur John Howard.

# Arbeiðsóhapp mundi endað í vanlukku



**Eitt arbeiðsóhapp umborð á einum skipi á Skála skipasmiðju kundi enda í einum sonnum sorgarleiki, tá tveir elektrikarar vórðu eitraðir av gassi. – Hetta eigur ikki at koma fyri, sigur stjórin á Skála skipasmiðju, Dánjal Andreasen, um málið, sum er meldað til Arbeiðseftirlitið**

ARBEIÐSTRYGD
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tíðliga í maimánaði var dúgliga rokast umborð á grønlendska skipinum »Erika«. Arbeiði av ymsum slagi skal gerast. Millum annað arbeiða nakrir mans við einum sonevndum freon-anleggi. Freon er eitt slag av gassi, sum upptekur ilt. Tað hvørki sæst ella kann luktast, og er tískil eitt ógvuliga lúnskt og vandamikið evni.

Uppiheldur tú teg í einum rúmi, har freon er likið út, so kanst tú uttan at vita tað smella í óvit, og tá gongur skjótt ein veg – altso skeivan veg.

### Freon-leki umborð

Tveir elektrikarar koma umborð henda dagin, arbeitt verður við freonanlegginum. Teir arbeiða fyri fyritøkuna El-Service og skulu hyggja eftir einum lensi-alarmi. Tí fara teir niður í kjølin í forskipinum. Á veg oman møta teir tveimum øðrum arbeiðsmonnum, men tá hesir einki siga um nakran vanda og ei heldur nøkur skeltir eru at síggja, ella útsúgving í gongd, gruna teir báðir elektrikararnir einki ilt.

Men løtan niðri í kjølinum gjørdist stutt – tíbetur kunnu vit eftirfylgjandi staðfesta. Beinanvegin menninir eru komnir niður kenna teir á sær, at her ruggar ikki rætt. Spakuliga gerast teir í ørviti, sjónin órógvast og teir byrja at missi følilsi í beinunum. Nøkur rør eru tikin sundur á freon-anlegginum. Hesi eiga at vera tóm, men av onkrari orsøk eru tey ikki tað, og freon lekur út í rúmi.

Hetta vita teir báðir elektrikararnir ikki av, men teir høvdu ikki verið í kjølinum í ein hálvan minutt, tá teir – uttan at vita hví – renna út alt tað, teir eru mentir.

Eftir sløkum hálvum minutti høvdu vórðu báðir tveir drenaðir fyri orku, og vóru um at missa vitið. Tað eydnast teimum tó at stríða seg upp og út, har teir tveita seg niður á dekki og lata luftina fylla lunguni aftur.

Frá lækna, sum kannaðir teir aftaná, hava menninir báðir fingið at vita, at teir hava verið ónatúrliga hepnir. Nøkur fá sekund aftrat í freon-fylta rúminum høvdu helst gjørt av við báðar tveir.

### Arbeiðseftirlitið bíðar

Hvussu ber tað til, at tílíkt kemur fyri? Leiðari á Skipasmiðjuni á Skála er Dánjal Andreasen, men hann hevur einki greitt svar upp á henda spurning.

– Vit vita ikki hví hetta hendi, men eru í gongd við at kanna hvat tað var sum hendi, soleiðis at vit kunnu fyribyrgja at slíkt kemur fyri aftur, sigur Dánjal Andreasen. Hann vísir á, at menninir hjá Skipasmiðjuni, sum vóru har frammanundan einki merktu.

– Men tílíkt eigur ikki at koma fyri, og vit ynskja saman við Arbeiðseftirlitinum at finna útav, hvussu tað bar til at hetta hendi, soleiðis at vit sleppa undan hesum eina aðru ferð, sigur hann.

Skipasmiðjan á Skála hevur latið Arbeiðseftirlitinum eina frágreiðing um tilburðin. Á Arbeiðseftirlitinum verður sagt, at tey í løtuni bíða eftir frágreiðingini frá El-Service. Samstundis verður eisini sagt, at tey ikki ynskja at bíða leingi aftrat eftir hesi frágreiðing, tá málið er so álvarsamt.



– Samanbera vit trygdina er hugburðurin avoldaður í Føroyum. Aðrastaðni verður gingið so ónatúrliga høg

# Fá sekund frá

**Janus í Løðuni og Dánjal Pauli Højgaard vórðu báðir eitraðir av gassi, tá teir vóru til eina arbeiðsuppgávu umborð á einum skipi. – Beinini reiggjaðu undir mær, og eg var um at missa vitið, sigur Janus, sum heldur at hugburðurin til arbeiðstrygd í Føroyum er avoldaður**

ARBEIÐSTRYGD
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað er mikudagur 2. mai. Janus í Løðuni av Eiði er sum vant til arbeiðis hjá El-Service á Skála. Saman við starvsfelaga sínum Dánjal Paula Højgaard av Toftum, skal hann umborð á eitt skip á Skála skipasmiðju.

– Har var eingin ávaring, einki skilti ella nøkur útsúgving, so vit fara niður í kjølin í góðari trúgv, greiðir Janus í Løðuni frá. Men teir báðir starvsfelagarnir hava ikki verið leingi har niðri, áðrenn teir varnast at okkurt er galið.

– Vit hava ikki verið har niðri í meiri enn 20 sekund, tá Dánjal Pauli spyr meg, um eg lukti nakað tí luftin er so trong. Eg kenni so á mær, at beinini byrja at reiggja undir mær, og skundi mær tí móti leytaranum.

Tað er tó ikki meiri enn akkurát so, at teir báðir klára út.

– Eg misti følilsi í beinunum, tað gjørdist torført at ganga, og eg megnaði akkurát at traðka seinasta feti. Komin út í fríska luft kenni eg, hvussu eg var um at missa vitið, greiðir Janus í Løðuni frá. Dánjal Pauli Højgaard sigur somu søgu.

### Sjúkrameldaður

Eftir at hava ligið á dekki-